# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Sørvágskvinnur aftur altvinnandi í ár



*Einki at siga til, at frøin á flogbóltskvinnunum hjá SÍ var stór sunnudagin, tá tær við sigri á Fleyr vunnu føroyameistaraheitið og harvið eisini greipuna – annað árið á rað*

*Mynd: Jákup á Stongum*

**Hóast SÍ hevur ein dyst eftir og okkurt av hinum liðunum fýra dystir eftir, er greitt, at sørvágskvinnur eru føroyameistarar – og harvið eisini greipuvinnarar. Tað gjørdist greitt, tá SÍ sunnudagin vann á Fleyr í Sørvági**

FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Árið í fjør var hjá SÍ-kvinnunum so gott, at tað næstan ikki kundi gerast betri. Liðið vann fyrst steypakappingina fyri fyrstu ferð og síðani føroyameistaraheitið, somuleiðis fyri fyrstu ferð. Men nú hava sørvágskvinnur endurtikið sveinastykkið, tí aftur í ár eru tær bæði steypavinnarar og føroyameistarar!

Sunnudagin SÍ tók ímóti Fleyr í Sørvági, og hetta var sostatt ein endurtøka av steypafinaluni millum liðini bæði eina viku frammanundan. Úrslitið gjørdist eisini ein endurtøka, tí enn eina ferð vann SÍ 3-1. Júst hesin sigurin var nóg mikið til at tryggja SÍ meistaraheitið, tí nú kann eingin annar røkka upp á tey 19 stigini, SÍ hevur vunnið sær.

Hesa ferð eydnaðist Fleyr at vinna fyrsta sett, men so svaraði SÍ aftur og tók tey bæði næstu settini. Í fjórða setti var SÍ á odda 20-13, men Fleyr kom upp á 21-21 og hevði enntá settbólt, tá støðan var 25-24. Men so tók SÍ um endan, vann settið, dystin og samstundis eisini føroyameistaraheitið.

Sostatt hevur enn eitt kappingarár fingið júst tann endan, sørvágskvinnur kundu ynskt sær. Tillukku við greipuni, SÍ-kvinnur!

**Meira um flogbólt í blaðnum í morgin**

**Ravnur FC er 23. lima-felagið í FSF**



**Kyndil enn á frostmarkinum**



**Bellamy gav United hjálpandi hond**